# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Nú fara republikanararnir at fylla ein lastbil við ruski, sum teir fara at tveita eftir Hillary Clinton*

*(Barrack Obama)*

# Læra børn at drepa fíggindan



*Í Irak verða børn niður í 10 ára aldur lærd at drepa fólk (Mynd: AP)*

**Amerikanska herleiðslan í Irak vil vera við, at har verða børn niður í 10 ára aldur lærd at drepa**

Børnini eru í ítróttarbúna, tey hava svartan gekkaskort fyri andlitið, og tey verða lærd, hvussu tey skulu sparka dyrnar inn hjá fólki, sum liggja við hús og sova.

Amerikanskir hermenn løgdu herfyri hald á eina sjónbandaupptøku, tá teir søktu at einum tilhaldi hjá al-Qaeda. Á sjónbandinum sæst, hvussu børn niður í 10 ára aldur verða lærd at ræna fólk og at beina fyri teimum. Amerikanska herleiðslan heldur upptøkuna vera eitt tekin um, at al-Qaeda roynir at fáa nýtt fólk.

- Hetta kann vera eitt tekin um, at al-Qaeda brúkar ungar irakar sum agn fyri at fáa eitt nýtt ættarlið at fara í stríð sum heilagir stríðsmenn, sigur ein talsmaður við AP.

Á sjónbandinum, sum fjølmiðlarnir sluppu at síggja í gjár, síggjast fleiri dreingir við patrónbelti um akslarnar. Seinni sæst, hvussu teir steðga einum manni við at hótta hann við byrsu. So noyða teir mannin at ganga eftir vegnum, og ein rødd biður dreingirnar sikta.

- al-Qaeda roynir at eitra ta unga ættarliðið í Irak, sigur talsmaðurin hjá amerikonsku herleiðsluni, Gregory Smith, við AP.

**Ræna børn**

Hvørki amerikanska herleiðslan ella iraksku myndugleikarnir vita, hvussu mong børn eru endað í føvninginum á al-Qaeda. Myndugleikarnir vísa tó á, at tað eru framvegis vaksnir menn, sum fremja nógv tey flestu álopini, men at í einstøkum førum hava álopsfólkini verið kvinnur ella børn.

Mohammed al-Askari, sum er talsmaður hjá irakska verjumálaráðnum, ivast kortini ikki í, at hernaðarligir bólkar burturflyta altsamt fleiri iraksk børn.

- Tað eru tó ikki øll børnini, sum verða rænd, tí tey skulu brúkast sum hermenn. Í fleiri førum krevja burturflytararnir pengar fyri at lata børnini leys, og pengarnir fara so til at fíggja al-Qaeda, sigur irakski talsmaðurin.

# Stjørnurnar fastur táttur í valstríðnum



*Oprah Winfrey*



*Arnold Schwarzenegger*



*Steven Spielberg*



*Stevie Wonder*



*Sylvester Stallone*

**Hollywood hevur í mong ár verið fastur partur av amerikanska valstríðnum, og soleiðis er eisini hesaferð**

Tað byrjaði longu í 1960, tá Frank Sinatra boðaði frá, at hann vildi hava John F. Kennedy at vinna forsetavalið, og síðani hevur tað verið siður, at filmsfólk, tónlistarfólk og onnur í amerikanska listaheiminum velja sær eitt valevni at styðja.

Í ár er listin langur, og serliga tey bæði demokratisku valevnini, Hillary Clinton og Barrack Obama, hava ein heilan her av films-, tónlistar- og ítróttarstjørnum. Tann seinasti, sum hevur sagt seg styðja Hillary Clinton, er filmsleikarin Jack Nicholson. Um orsøkina sigur hann, at Hillary er tað av valevnunum, sum hevur gjørt mest burtur úr einari neyðugari umskipan á heilsuøkinum, og so talar hon kvinnunnar søk, sigur Nicholson.

Onnur, sum styðja Hillary Clinton, eru fyrrverandi kurvabóltastjørnan Earvin Johnson, filmsstjørnan Barbra Streisand, leikstjórin Steven Spielberg og filmsleikarar sum Sally Fields, America Ferrara, Bradley Whitford og Ted Danson.

Barrack Obama er heldur ikki sørur, minni enn so. Millum teirra, sum styðja hann alment, er sjónvarpskvinnan Oprah Winfrey, filmsstjørnurnar Robert de Niro og Scarlett Johansson, sangararnir Stevie Wonder og John Legend, rithøvundurin Toni Morrison og glímarin Hulk Hogan.

Republikanararnir hava ikki sama veljaratekki í Hollywood sum demokratarnir, og tað sæst aftur á stuðlalistanum. John Mc Cain hevur tó fingið stuðul frá tveimum sterkum monnum, Arnold Schwarzenegger og Sylvester Stallone, og Mike Huckabee hevur ofta tann gamla Texas Ranger-filmsleikaran Chuck Norris undir liðini á sær.

Stjørnurnar kunnu eisini brúkast til okkurt skemtiligt av og á. Nú ein dagin segði Chuck Norris, at tann 71 ára gamli John McCain er ov gamal til at gerast forseti. Svarið kom beinanvegin:

- Chuck skal ansa eftir, hvat hann sigur, tí annars sendi eg Sylvester Stallone eftir honum, segði McCain.

## STUTT SAGT

### Eldsbruni kanska ásettur

Turkisku myndugleikarnir ætla sær at kanna, um nakar setti eld á, tá níggju fólk doyðu í einum eldsbruna í týska býnum Ludwigshafen sunnudagin. Átta teirra vóru av turkiskum uppruna. Ein kvinna skal hava greitt frá, at hon sá ein mann festa í húsini. Tað sama hendi fyri einum ári síðani, men ta ferðina bleiv eldurin sløktur. Turkiski forsætisráðharrin, Tayyip Erdogan, segði í gjár, at turkisku myndugleikarnir vilja hava málið kannað sum skjótast. Hann segði seg vóna, at talan var um ein vanligan eldsbruna og ikki fíggindasinnaðan ágang ímóti fólki av fremmandum uppruna.

### Sjúkur fangi fær ikki viðgerð

Í Russlandi hevur ein dómstólur noktað Vasilij Aleksanian at sleppa úr fongslinum, so hann kann fáa viðgerð fyri eyðkvæmi og krabbamein. Vasilij Aleksanian var stjóri í almenna oljufelagnum Yukos og fekk fongsulsrevsing fyri svik. Verjar hansara siga, at hann er illa sjúkur, og at hann fer at missa sjónina, fær hann ikki viðgerð. Men tað heldur rætturin ikki vera neyðugt.

### Romano gevst

Romano Prodi, sum júst hevur lagt frá sær sum forsætisráðharri í Italia, kunngjørdi í gjár, at hann fer ikki at stilla upp á tjóðartingsvalinum, sum verður í apríl. Við tíðindafólk segði Prodi seg vóna, at avgerð hansara um at gevast kann reinsa luftina og slætta sjógvin í tí komandi valstríðnum. Romano Prodi, sum fyrr hevur verið formaður í ES-nevndini, var italskur forsætisráðharri í 20 mánaðir, til eitt misálitisuppskot feldi stjórn hansara.